## Sjálvboðin til Mars

Skuldi nakar havt hug til eina ferð til Mars, so lýsir europeiska rúmdarsamtakið eftir sjálvbodnum fólki til eina Marsferð. Tað vil siga, tey seks sjálv bodnu koma ikki til Mars, men tað fer at kennast so. Ímyndaða rúmdarferðin skal fyrireika komandi veruligu rúmdarfólkini til ógvusligu ávirkanina, teir far at kenna. Manningin skal uppliva ovurmikið einsemi og innisælu. Tey fara at missa jørðsýnið burtur og tað fer at taka 40 minuttir at samskifta. Og tá tey »koma fram«, skulu tey gera eina ímyndaða kanning av klótuni.



## Nevndin óbroytt

Seinasta fríggjadag hevði Havnar Arbeiðsgevarafelag árliga aðalfundin. Fyri vali stóðu Høgni Hansen og Hákun Djurhuus. Báðir vóru afturvaldir. Nevndin í Havnar Arbeiðsgevarafelag heldur tí fram óbroytt. Í henni sita Hákun Djurhuus, formaður, Joel undir Leitinum, næstformaður, Gunnar Mohr, Árni Joensen og Høgni Hansen.

# Tjaldur og Kvettið í serstøðu

**Tveir íleggjarar fingu loyvi at keypa partabrøv fyri 136 milliónir hvør. Samstundis upplivdu aðrir, at teir bert fingu 2% av tí, sum teir ynsktu at keypa**

EINSKILJING
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Umframt Fíggingargrunnin frá 1992, so standa í dag tveir partaeigarar á yvirlitinum yvir stórpartaeigarar í Føroya Banka. Stórpartaeigarar eru eigarar, sum einsamallir hava valdið á í minsta lagi 5% av partapeninginum.

Teir báðir eigararnir eru Sp/f Kvettið, sum Jákup á Dul eigur, og Skrínið Sp/f, sum er partur av P/F Tjaldur. Tey bæði feløgini hava keypt partabrøv fyri 136 milliónir, svarandi til 7,20% av samlaða partapeninginum.

Tað hevur skapt bæði undran og øsing millum aðrar íleggjarar, at tveir einstakir partaeigarar hava fingið loyvi at tekna somikið stóran part av samlaða útboðnum. Hetta samstundis sum hópur av øðrum keyparum stendur eftir við millum 2% og 20% av tí, sum hesir høvdu teknað seg fyri.

### Viðgjørt hvør sær

Í tíðindaskrivinum, sum Føroya Banki sendi út, tá partabrævatekningin var av, stóð at lesa, at ávísur býtislykil var galdandi fyri smærru íleggjararnar. Men at hesin ikki var galdandi fyri størru íleggjararnar. Hesir vórðu ístaðin viðgjørdir einsæris. Og við tveimum eigarum við 136 milliónum hvør, tykjast hesir eisini vera viðgjørdir so ruddiliga einsæris.

Spurningurin er tí, hví einstakir keyparar eru tiknir fram um aðrar. Og – ikki minst – hvørji kriterium eru nýtt, tá hesir eru valdir.

Tað er Fíggingargrunnurin, sum fyrrverandi eigari, ið saman við útlendskum ráðgevum hevur staðið fyri einskiljingini. Vit royndu í dag at fáa viðmerkingar um málið frá Eyðun á Rógvi, formanni í Fíggingargrunninum. Men hann sat á fundi, og fekk tískil ikki gjørt viðmerking, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*Formaðurin í Fíggingargrunninum, Eyðun á Rógvi, fekk ikki gjørt viðmerkingar til partabrævabýtið millum stovnsíleggjarar, áðrenn blaðið fór til prentingar*

# Nevnd og stjórn stóran lut

**Upplýsingar frá børsskrásetingini OMX vísir, at hvørki nevnd ella stjórn í bankanum hava verið við sviðusoð, tá partabrøvini vórðu seld**

PARTABRØV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er ikki bert vanligi føroyingurin og føroyskar íleggingarfyritøkur, ið hava stórt álit á framtíðar vánunum hjá Føroya Banka. Heldur ikki steðgar álitið við útlendsku íleggjarunum, tí eisini nevnd og stjórn í bankanum hava stórt álit á sær sjálvum.

Í hvussu er hava hvørki nevnd ella stjórn hildið seg aftur við at gera íløgur í partabrøv hjá Føroya Banka. At yvirtekningin so gjørdist størri, enn nakar hevði droymt um hevur ført til, at smærru, ella privatu, íleggjararnir blivu munandi skerdir. Sum kunnugt fingu øll upp til 11.340 krónur, men eftir tað bert 2% av upphæddini, sum fór upp um tað.

Meiri ógreitt er, um sama var galdandi fyri størru – sonevndu strategisku – íleggjararnar.

Millum hesar roknast stjórarnir báðir, Janus Petersen, forstjóri og Súni Schwartz Jacobsen. Ilt er sjálvandi at vita og gita um, hvussu nógv teir báðir høvdu teknað seg fyri av partabrøvum, men tá bankin varð skrásettur á børsinum klokkan 11 í gjár, vísri yvirlitið hjá OMX, at Janus Petersen hevði fingið partabrøv fyri 6 milliónir og Súni Schwartz Jacobsen fyri 4,5 milliónir

**Upplýst tøl frá OMX**

| Nevndarlimir | Partabrøv | Keyp í DKK |
|---|---|---|
| Jóhan Páll Joensen | 1.762 | 333.018 |
| Jens Erik J. Christensen | 1.161 | 219.429 |
| Sigmar B. Jacobsen | 585 | 110.565 |
| Olav Enomot | 538 | 101.682 |
| Eyðhild Skaalum | 330 | 62.370 |
| **Stjórn** | | |
| Janus E. Petersen | 37.066 | 7.206.874 |
| Súni Schwarz Jacobsen | 23.810 | 4.500.090 |
| **Stórpartaeigarar** | | |
| Fíggingargrunnurin | 3.942.280 | 745.090.920 |
| Kvettið Sp/f | 720.000 | 136.080.000 |
| Sp/f Skrínið | 720.000 | 136.080.000 |

*Soleiðis hava nevnd og stjórn sett pening í Føroya Banka. Upplýsingarnir eru tiknir frá OMX-skrásetingini í gjárkvøldið*

### Nevndin ikki so slúkin

Júst hvussu raðfestingin hjá Fíggingargrunninum frá 1992 hevur verið, tá partabrøvini eru útlutað, er ikki lætt at siga. Tað stendur tó greitt, at starvsfólkini í bankanum vóru tryggjað 500 partabrøv í part. Um hetta var galdandi fyri stjórnina eisini er okkum ikki greitt í løtuni, men tað er væl hugsandi, at annar býtislykil er nýttur har.

Tað kann her skoytast upp í, at Janus Petersen, eftir at børsurin læt upp, keypti 5,300 partabrøv aftrat, og eigur sostatt góð 37.000 partabrøv tilsamans í bankanum.

Nevndin hevur eisini stórt álit á, at bankin frameftir fer at verða ein bæði sunn og gevandi fyritøka. Tey fimm í nevndini hava eisini sett rættiliga fitt av peningi í Føroya Banka, men tó ikki í nánd av tí, stjórarnir hava sett í. Bankaumboðini í nevndini hava fyri so vítt fingið lutfalsliga lítið meiri enn tað, tey vóru tryggjað sum starvsfólk, meðan hini trý hava tikið djúpt í lumman, um býtið hevur verið tað sama fyri tey, sum fyri aðrar smærri íleggjarar.

Sum nevnt vita vit ikki nágreiniliga, hvussu býtið hevur verið, og tí skal hetta á ongan hátt skiljast sum ein atfinning at teimum, sum hava fingið tillutað fleiri partabrøv enn tey flestu.